

# Brúka eina milliard til oljugransking

**Jan Müller**

13.05.2014 - 19:20

Oljan.fo

Dansk Undergrunds Consortium, sum er millum tey virknu oljufeløgini í Norðsjónum, hevur gjørt av at skipa ein nýggjan granskingarstovn saman við Danmarks Tekniske Universitet.

Í hesum viðfangi hevur DUC gjørt av at brúka eina milliard krónur til granskingarstovnin tey næstu tíggju árini. Málið er at vita, hvat skal gerast fyri at fáa ein enn størri part av oljuni og gassinum upp undan botninum í tí danska partinum av Norðsjónum.

Sum er verður mett, at oljufeløgini fáa 26 prosent av oljuni og gassinum upp úr brunnunum í tí danska økinum, og tað er greitt, at sjálvt ein lítil bati her kann skjótt kasta væl av sær.

Bo Cerup-Simonsen, sum er stjóri fyri teirri nýggju granskingarverkætlanini, sigur, at ber tað til at fáa eitt prosent upp afturat, gevur tað 70 milliardir krónur í øktum framleiðsluvirði. Bo Cerup-Simonsen er fyrrverandi stjóri Maersk Maritime Technology.

Maersk Oil eigur 31,2 prosent av framleiðsluni hjá Dansk Undergrunds Consortium og er fyristøðufelag. Shell er tann største einstaki eigarin við 36,8 prosentum, Norðsjóvargrunnurin eigur 20 prosent og Chevron tey seinastu 12 prosentini.